## NORÐURLANDAHÚSIÐ

# Tiltøk í oktober 2000

**Fríggjadagur 06.-14.** **kl. 13.00-20.00**
Talvkapping
»3rd Tórshavn International Open«

**Týsdagur 17.** **kl. 19.30**
Konsert v/ Føroya Jazztónleikarafelagi
**Hósdagur 19.** **kl. 09.30**
»Granskingarverkætlan fyri Økismenning«
skipar fyri fyrilestri um økismenning
**Fríggjadagur 20.** **kl. 20.00**
Barnadansur v/ Dansifelagnum í Havn
**Leygardagur 21.** **kl. 16.00**
Hornorkesturkonsert
v/ Langelandsgarden, Danmark
Finsk/donsk listaframsýning letur upp **kl. 18.00**
Á framsýningini kunnu síggjast fotomyndir
hjá Britt Mari Friberg, Finnland, málningar
hjá Pia Mesterton Graa, Danmark
og skurðmyndir hjá Tiina Laasonen, Finnland.
(Framsýningin er í húsinum til og við 19. nov.)
Jassarnir spæla í sambandi við upplatingina.
**Sunnudagur 22.** **kl. 16.00**
Konsert v/ Føroya Symfoniorkestri
Á skránni verða m.a. verk eftir:
Mendelsohn og Johan Straus.
**Hósdagur 26.** **kl. 19.30**
Orfeus. Musikkfelag Norðurlandahúsins.
Klassiks konsert. Á skránni verður:
Duo v/ Nikolaos Kapnas, viólaleikari
og Stamen Stantchev, klaverleikari.
Spæld verða verk eftir Bach, Chopin
og Zimbalist
**Fríggjadagur 27.** **kl. 20.00**
Barnadansur v/ Dansifelagnum í Havn
**Sunnudagur 29.** **kl. 16.00**
Kórkonsert við útisetakórinum MPIRI
Framførd verða verk eftir Trónda Bogasyni.

**Norðurlandahúsið inkl. kaffistovan hevur opið**
**yrkadagar kl. 10-18 sunnudagar kl. 14-18.**
**Broytingar kunnu koma fyri. Hoyrið tí ÚF-lýsingar og sí skránna á tekstvarpi í SVF frá s. 650**

**Norðurlandahúsið í Føroyum**
**Telefon 317900 • Fax 319790**
**E-mail: nlh@nlh.fo http://www.nlh.fo**


**Sig okkum frá**



Hendir okkurt, sum er áhugvert hjá øðrum at vita, eru vit til reiðar at bera tíðindini víðari.
Sosialurin leggur seg eftir at bera tíðindi úr øllum landinum.
Vit koyra runt í tí kenda, gráa Toyota bilinum við eyðkendu frámerkjunum.
Ferðandi blaðstjórnin er dagliga úti kring landið.
Vit eru at hitta á telefon nr. 31 18 20.
Telefax nr. 31 47 20.
Edvard Joensen mannar í løtuni ferðandi blaðstjórnina. Hann er at hitta á telefon nr. 42 36 17 ella á fartelefon nr. 22 33 37.
Eisini ber til at senda teldupost til:
edvard@sosialurin.fo
ella post@sosialurin.fo
Tíðindablaðið sosialurin






**Knæsokkar fra DIM**
Tann breiði elastikkanturin forðar fyri merkjum á beinunum og ger at sokkurin passar perfekt
Fáast í tínum klædnahandli
DA FA Tel. 319591






**Hydraulikkhamarar 10-30 kg**
*Mobilar drívstøðir*
*Lítlar og handingar*
*Høgan effektivitet*
*Ristast lítið*
*Fleksibul íbinding*
Leverandørurin til entreprenørar í 28 ár. Tosið við okkum!
**Kaj Andreasen & Co**
Sandvíkarhjalli - Tel. 315600 - Fax 318008
Sosialurin - 311820



fk



**Føroya største úrval av**
**PAKKITILFARI**
**úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir**

Vit útvega eisini:
- Plastbakkar
- Pakkibond, tape
- Merkir, etikettir
- Knívar
- Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
- Ymisk tól til ídnaðin
- Reingerðisevnir
- Tilsetningsevnir
- Plattar
- Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

*...sjálvandi til besta prísin!!*

**FARPACK**
*Staravegur 5, P.O. Box 3099*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*







**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 2768, **Sp/f Pure Water, 700 Klaksvík.**

**Vi›tøkur broyttar:** 29.08.2000.
**N‡tt navn:** Sp/f Onyx

Skráseting Føroya tann 4. oktober 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 1277, **P/F Kári Johannesen Maskinverksta›ur, 530 Fuglafjør›rur.**

**Vi›tøkur broyttar:** 03.08.2000.
**Nevnd:**
Farin frá sum forma›ur: Lillian Johannesen, 530 Fuglafjør›ur.
Innkomin í nevndina sum forma›ur: Óli Samró, Marinargøta 9, 188 Hoyvík.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur bundi› vi› undirskrift av nevndarformanni ella av felagsins stjóra.

Skráseting Føroya tann 4. oktober 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 1202, **P/F H. A. Danielsen, 100 Tórshavn.**

**Vi›tøkur broyttar:** 02.06.2000
**N‡tt navn:** Sp/f H. A. Danielsen
Lækkan av P/F-peningi til útgjalding til partaeigarar vi›tiki› 02.06.2000 er nú gjøgnumførd.
**Kapitalur:** Kr. 290.000,00.
**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Jóhanna Beata Sólrun Nor›foss, Noregsvegur 10, 100 Tórshavn (forma›ur), Hans Andrias Danielsen, 490 Strendur og Poul Gothard Danielsen, 490 Strendur.
**Tekningarreglur:** Felagi› ver›ur tekna› av stjórnini.

Skráseting Føroya tann 4. oktober 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 2409, **P/F Va›horn Seafood, 490 Strendur.**

**Stjórn:**
Farin frá sum stjóri: Hjørleif Dahl, 460 Nor›skáli.
Innkomin sum stjóri: Ingun Olsen, 600 Saltangará.

Skráseting Føroya tann 4. oktober 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 673, **Sp/f R. Rasmussen Eftf., 360 Sandavágur.**

**Vi›tøkur broyttar:** 03.08.2000.
**Kapitalur:** Hækking vi› kr. 1.000,00 til kr. 101.000,00
Inngjaldingarháttur: Kontant kr. 1.000,00 til kurs 7000

Skráseting Føroya tann 4. oktober 2000

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett ni›anfyri standandi frábo›an:**

Skrásetingar-nr. P/F 2039, **P/F Krossbrekka, 513 Sy›rugøta.**

**Nevnd:**
Farin úr nevndini: Jallgrímur Atli Hansen, 510 Gøta (forma›ur) og Ragnar Simonsen, 510 Gøta.
Innkomin í nevndina: Jógvan David Jacobsen, 512 Nor›agøta (forma›ur), Tummas Thomsen, 513 Sy›rugøta, Jógvan Hentze, 512 Nor›agøta og Frits Thomsen, 513 Sy›rugøta.

Skráseting Føroya tann 4. oktober 2000

Kristin Balle

---


JUNIOR
BUSS TAXA KOYRING
pláss til 10 ferðandi
Tlf. 22 33 11
Eyðbjartur Danielsen
Pætursgøta 14 • FO-188 Hoyvík • Tórshavn




# Ein føðingardagsheilsan til Poul E. Poulsen á sjeyti ára degnum



Í dag, 6. oktober, eru sjeyti ár liðin, síðan Poul E. Poulsen, eisini róptur Poul á Skalla, varð borin í heim á Heyggi í Hvalba. Av einum systkinaflokki uppá seks er Poul triðelstur.

Poul er sonur Annu og Jacob Meinhard Poulsen. Tað lítla heimið, sum stóð á Heyggi, kundi ikki sammetast við tað, sum vit vanliga kalla ein bústað í dag. Hetta lítla húsið var heimið hjá Poul og systkjunum, til hann var gott og væl hálvvaksin, men so mangan havi eg hoyrt Poul tosað um hvussu tey kláraðu seg, har kærleikin, trúgvin á hin altvaldandi og lívstreystið vóru lyklaorð, sum fingu alt at ganga. Ikki vóru treytirnar altíð tær bestu, men øll tóku eina hond í og soleiðis gekk tað. Tað var púra vanligt, at børnini eftir konfirmatiónina luttóku í dagliga arbeiðinum.

Miðskeiðis í fýratiárunum flutti familjan í tey húsini, sum í dag standa á Skalla í Hvalba. Hesi hús læt Jacob M. Poulsen byggja, og familjan fekk meiri pláss, men kortini var húsplássið ikki so nógv, tá hugsað verður um at tey vóru átta fólk í húsi.

Sum 17 ára gamal fór Poul sín fyrsta túr til skips. Hetta var við Drátti, og við hesum byrjaði lívið hjá Poul sum sjómaður. Her var hann við til hann í 1950 fór við Kalsevni at royna undir Íslandi og Grønlandi. Tíðin við Kalsevni hevur heilt greitt verið nakað serligt fyri Poul, mangan hevur hann greitt frá tíðini við Kalsevni, har hendingar og løtur – strævnar sum góðar – góvu hesum, tá unga hvalbinginum, royndir, sum hann ivaleyst seinni mangan gjørdi nýtslu av.

27. des. 1953 varð brúdleyp hildið í Hvalba. Tá giftist Poul við Kristinu Thomsen, ættað úr Sandvík og uppfostrað hjá Dánjal og Olinu Thomsen í Garðsini í Hvalba. Saman fingu tey 5 børn: Gunnhildur, Annolina, Dagbjørt og tvíburðarnar Johild og Berghild. Húsið á Skallanum bleiv somuleiðis teirra barnaheim, har tær vuksu upp, og hugnin saman við foreldrunum, ommuni Annu og abbanum Jacob Meinhard var í hásætinum. Vit onnur kunnu bara ímynda okkum tann mennandi og gevandi uppvøksturin húsið á Skalla hevur verið karmur um.

Poul var eisini við, tá føroyingar fyrst í sekstiárunum leitaðu til Grønlands at rógva út; við »Skallabrøður« róði hann út saman við øðrum frá apríl mánaði og til september frá 1960–63. Honum dámdi væl umhvørvið í Grønlandi og í Føroyingahavnini og fyri flest allar teir føroyingar, sum vóru í Grønlandi, og familjur teirra, sum vóru eftir heima í Føroyum, var hetta ein minilig tíð, og fyri Poul var hetta tíðarskeið nakað heilt fyri seg; og lítið man vera at ivast í, at Poul er glaður fyri at hava verið millum teir føroyingar, sum leitaðu nýggjar leiðir fyri at vinna sær til dagin og vegin, og í mangar mátar hava sett varðar eftir seg, fyri eftirtíðina at líta aftur á.

Um veturin, tá ikki varð róð út í Grønlandi, varð arbeitt í kolinum í Hvalba, og annars alt fyrifallandi, sum var at gera.

Við áræði og dirvi tók Poul saman við øðrum stig til at keypa útróðrarbátin, sum teir nevndu Glyvraberg. Og við hesum róðu teir út í fleiri ár. Fiskieydnuna høvdu hesi royndu menn góða, og mangan fongin hava teir ført til lands millum ár og dag.

Poul fór í sjeytiárunum at fiska við norðmonnum. Var eitt stutt bil við bátinum Longva, til hann mynstraði við Sjøvik, har var hann við til hann í 1974 meiðslaði seg so illa, at hann mátti gevast við sjólívinum og legðist upp á land.

Hóast hetta var ein sera stór broyting í lívinum hjá Poul, sum hevði serligan tokka til sjólívið, misti hann ongantíð mótið, men byrjaði harafturímóti at skapa sær eina tilveru á landi.

Lívsmótið og vónin um at framtíðin altíð lagar seg, hevur altíð sermerkt Poul, eisini tá tilveran ikki altíð hevur verið soleiðis sum ein kundi hugsað sær.

Hann er kendur fyri sítt serstakliga góða hegni at gera prýðislutir, tað veri seg sluppir, modell av útróðrarbátum, lampur, veggjaprýði – tað eru ikki so fá heim í Føroyum, sum eftirhondini hava eitt nú grindareiðskap hangandi á bróstinum og eina lampu standandi á hillini. Hetta er eitt ítriv, sum pápi hansara eisini fekst við, og sigast má, at Poul hevur við sera hepnari hond ført hetta víðari.

Poul fór upp í nevndararbeiði hjá Bóltfelagnum Royn, har hann var við í fleiri ár og royndi at samskipa og leggja til rættis tiltøk, sum skuldu bera felagnum fíggjarliga.

Samfelagsmál hava altíð havt tann stóra áhugan hjá Poul, og mangt kjakið hava vit báðir verið ígjøgnum, og hóast vit kanska ikki hava verið so samdir politiskt, so hevur kjakið altíð verið gott og gevandi, og meira enn einaferð mátti eg ásanna, at aldursmunurin og lívsroyndirnar vóru Poul til fyrimuns.

Hansara nærmastu hava altíð staðið hjarta hansara næst. Børnunum hevur hann altíð veitt stuðul og hjálp, bæði á ein og annan hátt, hann er glaður, tá tað gongst teimum væl og er altíð til reiðar, um okkurt ikki gongur eftir vild, og konuni hevur hann verið ein góður maður.

Tá mamma hansara gjørdist lamin, umbygdi Poul húsini, soleiðis at hann kundi hava mammu sína heima og vera um hana.

Abbabørnini hava øll sum ein havt sítt serliga pláss í hjartanum hjá Poul, og eg meti ikki eg fari skeivur, tá eg sigi, at tað altíð hevur verið nakað serligt hjá ommubørnunum og abbabørnunum at hava verið hjá ommuni og abbanum í Hvalba.

Við hesi kvøðu vil eg enn einaferð ynskja Poul hjartaliga tillukku við sjeyti ára degnum við ynskjum um alla góða eydnu og harrans signing í framtíðini.

**Áki**

**nøvn nú** **nøvn nú**

## Heilsanir



***Gó›a Randi***
Hjartaliga tillukku vi› 50 ára fø›ingardegnum og gó›a veitslu leygarkvøldi› ynskja
***vit á Argjum***



***Gó›u abbi og omma!***
Eg ynski tykkum hjartaliga tillukku vi› fø›ingardøgunum 5. okt. og 23. okt., og alt ta› besta í framtí›ini.
***Kærastu heilsanir Ó›in***



***Gó›a, elska›a Tóra***
Hjartaliga tillukku vi› 4 ára degnum tann 3.10.
***Kærar heilsanir frá ommu og abba í Uppsalagøtu***





***Gó›i Torfinn og Johannes Groth***
Hjartaliga tillukku vi› 4 og 5 ára fø›ingardøgunum ynskja
***vit í Stoffalág***



***Elska›a Tóra***
Hjartaliga tillukku vi› 4 ára degnum.
***Muss og klemm frá Fró›a***



***Gó›i Reidar***
Hjartaliga tillukku á 11 ára degnum í dag.
***Bestu ynski frá ommuni, abbanum og Óla gubbanum***

**nøvn nú** **5 ferðir um vikuna** **25,- kr.**

**GEVIÐ GÆTUR:**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við 25,- kr. pr. mynd í krossaðum kekki fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjalda í avgreiðsluni á Argjavegi 26, millum kl. 8.00 og 16.00.

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 2 dagar fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

❑ Týsd. ❑ Mikud. ❑ Hósd. ❑ Fríggjad. ❑ Leygard.

Tekstur: ..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................
..........................................................

**MYNDINA AFTUR:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og at leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði.

*Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.*

Sent hevur **(skal fyllast út).**
Navn: ..........................................................
Bústaður: ..........................................................
Bygd/býur: ............................ Tlf.: ...............

Sendið lepan, mynd og gjald til:
**Tíðindablaðið Sosialurin**
Postsmoga 76, 110 Tórshavn
Merkið bjálvan: »**NØVN NÚ**«